tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 03.02.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, ~~Anita Vibergsdóttir~~, Alvi Mortensen, ~~Jónleyg Jespersen~~ Bech, Bjarni Hammer, ~~Kristina Roest~~, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jónhild Midjord Nybo og Mina Joensen

Ikki møtt: Fráboða, Jónleyg Jespersen Bech og Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/22 | 21/00329-10 | Val av nevndarlimum í BHS Bú- og Heimatænastuna -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu setuna 2021-2024 |
| 2/22 | 22/00025-1 | TB -Tvøroyrar bóltfelag nýtslurætt til vøl og felagshús við Stórá 2022 |
| 3/22 | 22/00016-2 | TEKNISKA DEILD - BILAR - Ford Ranger XL Double cab - Nýggjur bilur er bílagdur í 2021 |
| 4/22 | 22/00041-2 | Tvøroyrar Skúli -Samvirknar talvur og KT útbúnaður 2022 |
| 5/22 | 22/00043-2 | Skjalhald 360 -mannagongdir 2022 |
| 6/22 | 22/00083-1 | Ungi arbeiði 2022 |
| **Til kunningar** | | |
| 1/22 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| 2/22 | 22/00036-2 | Endaligt frágreiðing og eftirmeting av eldraøkinum -skriv frá Kommunufelagnum jan. 2022 |
| 3/22 | 22/00082-2 | Vinabýir [redacted] |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, og kunnar um at 3 býráðslimir hava fráboða forfall til fundin.

Fráboðan um forfall er komið frá Anitu Vibergsdóttir 2. feb, frá Jónleyg J. Besch 2. feb. Og eru vara limir biðin um at møta. Fráfoboðan um forfall er komið frá Kristinu Roest 3. feb, stutt áðrenn fundin og er fráboðan send til varalim.

Atkvøtt verður um hvørt Jónhild Midjord Nybo og Mina Joensen, sum ávikavist fyrsti og annar varalimur á lista T, Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 kunna taka sætið í býráðnum. Hetta er einmælt samtykt.

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, tí at málið val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS ikki er á skrá, og ynskjir hon at hetta mál verður sett á skrá.
Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 2 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021. Men um meiriluti er fyri at viðgera hetta mál fyri 3 ferð í býráðnum, verður hetta mál sett á skrá, um ongin er í mótið.
Atkvøtt var um at seta málið á skrá, einmælt samtykt.

Fundurin verður niðurlagdur í 5 min. fyri at broyta skránna og leggja málið val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS á skrá.

Fundurin verður tikin upp aftur kl. 17:20.

**Til støðutakan**

**1/22**
**21/00329-10 Val av nevndarlimum í BHS Bú- og Heimatænastuna -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu setuna 2021-2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.01.2022 | 7/22 |
| 2 Býráðið | 03.02.2022 | 1/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 17.01.2022**
Eftir áheita frá forkv. í sosialu nevnd verður ynskið frá býráðslimi Súsonnu Bertholdsen, um val av limum til BHS Bú- og heimatænastuna sett á skrá til fund í sosialu nevnd.

**Málsgongdin:**
Tvøroyrar býráð hevur hin 4. Januar 2021 við skipan av nývalda býráði á Tvøroyri, eftir kommunuvalið 10. nov., valt í stýrið fyri BHS:

- Jónleyg Jespersen Bech, sum fastur limur
- Anitu Vibergsdóttir, sum varalim
- Borgarstjórin er føddur limur

Og hin 1. Mars viðgjørdi býráðið av nýggjum val av stýrislimum í BHS eftir at komið var eftir, at valið av varalimum ikki var fari fram eftir lutfallsvalháttinum, men eftir meirilutavalháttinum

Tvøroyrar býráð hevur hin 1. mars 2021, valt í stýrið fyri BHS av nýggjum:

- Jónleyg Jespersen Bech, sum fastur limur
- Bjarni Hammer, sum varalim
- Borgarstjórin er føddur limur

Eftir valið hin 1. Mars 2021 hevur kommunalaeftirlitið fingið enn eina klagu frá býráðslimi í Tvøroyrar býráð um valið av stýrislimum í BHS umboðandi Tvøroyrar kommunu.

Avgerðin hjá Kommunalaeftirlitið er, at Kommunalaeftirlitið hevur tað fatan, at borgarstjórin, ið er føddur limur í stýrinum fyri BHS, skal teljast við býtinum av limum hjá valbólkunum, og eigur valið at ganga um aftur.

Hesa fatanina hjá Kommunalaeftirlitinum, er síðani løgt fyri Kommufelagið av borgarstjóranum. Kommunufelagið er ikki er samd við niðurstøðuna hjá kommunalaeftirlitinu, men hevur tað fatan, at umboðanin hjá býráðnum í stýrinum fyri BHS, skal endurspegla viljan og styrkjuna hjá býraáðnum, har størri kommunurnar fáa 2 føst umboð, og tí skal borgarstjórin ikki telja við í býtinum av stýrislimum.

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

- *§ 35. Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tilíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.*
  - *§ 2. Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum frá teimum, ið eru á fundi, er valt.* ○ *Stk. 2. Fæst tilíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.*
  - *§ 3. Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m..

- *§ 7. Javnbjóðis samstarv inniber, at kommunurnar eru felags um at røkja heimatænastu, eldrarøkt v.m.. Kommunurnar velja eitt stýri at fyrisita nevnda øki. Í stýrið verða valdir í minsta lagi 5 limir. Hvør kommuna fær 1 lim og 1 varalim. Borgarstjórin er fyrstvaldi limurin. Í kommunum við fleiri enn 1 limi verða valdir 2 varalimir, fyrsti og annar varalimur. Varalimirnir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.*
  - *Stk. 2. Kommunur við oman fyri 1000 íbúgvum við ársbyrjan í valárinum fáa 1 lim afturat pr. 1000 íbúgvar. Hesir verða valdir millum kommunustýrislimirnar.*

**Niðurstøðan hjá kommunufelagnum í eftirmetingini av eldrasamstarvinum:**

**6.3.4 Ónøgd við valdsbýtið í samstørvunum**

Sum ásett í § 7 stk. 2 í lógini, hevur hvør kommuna ein lim í stýrinum fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Motivatiónin fyri hesum er, at javnvág skal verða millum umboð í stýrinum og fólkatal í einstøku kommununum. Borgarstjórarnir í kommununum eru føddur limir í stýrinum í samstarvinum, men hevur ein kommuna t.d. 1.300 íbúgvar, fær hon 1 umboð afturat í stýrið, og hevur ein kommuna t.d. 2.300 íbúgvar, fær kommunan 2 umboð afturat í stýrið.

Í summum førum hava kommunur, sum hava tvey umboð, valt seinna umboðið sambært meirlutavalháttinum. Í einum føri er valið eftir hesum leisti kært til Umhvørvis og Vinnumálaráðið

**Niðurstøðan hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum var:**

*"Tá ið ein kommuna skal vera umboðað í eini nevnd við fleiri kommunustýrislimum, er útgangsstøðið eftir kommunustýrislógini, at umboðini skulu veljast eftir lutfalsvalháttinum.*
*Endamálið við lutfalsvalháttinum er at tryggja eina støddfrøðiliga rættvísa umboðan, so at politiska javnvágin í kommunustýrinum eisini endurspeglast í umboðanini í eini nevnd ella tilíkum. Á henda hátt forðar lutfalsvalhátturin fyri, at valdsjavnvágin í kommunustýrinum skeiklast í umboðanini. Verður sessurin hjá borgarstjóranum ikki taldur við ella mótroknaður, kann bólkurin hjá borgarstjóranum fáa ein órimiligan fyrimun".*

Kommunufelagið og kommunurnar eru ónøgdar við hesa niðurstøðu. Tá ið valt verður sambært lutfalsvalháttinum, og tá ið kommuna skal velja tvey ella annað líkatal av umboðum í stýrið, so verða meirilutin og minnilutin í einari kommunu í praksis javnstillað. Hetta meta kommunurnar og Kommunufelagið er, um nakað, at skeikla valdsjavnvágina í einum kommunustýri. Kommunurnar meta, at ásetingarnar í § 7 sum heild ikki eru ætlaðar at regulera valdsjavnvágina í kommunustýrinum, men hinvegin einans eru ætlaðar at tryggja javnvág millum stødd og umboðan stýrinum í millum partarnar í kommunala samstarvinum.

Júst hendan ónøgdin lýsir enn ein nýskaptan trupulleika við tvingaðum millumkommunalum samstørvum við sjálvstøðugum avgerðar- og fíggjarmyndugleika í eini skipan við kommunalum sjálvræði.

Mælt verður til at endurskoða § 7 stk. 2 við atliti at, hvussu einstøku kommunurnar í samstørvum verða umboðaðar, undir hesum at tryggja, at umboðanin eisini verður í samljóði við støddina á kommununum í samstarvinum.

**Fíggjarligar avleiðingar: ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 18. januar 2022:**
Einmælt samtykt at beina málið í býráði.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Bjarni Hammer mælir til at Súsanna Bertholdsen verður vald sum sum limur í Bú- og heimatænastuna
Atkvøtt var um tilmælið hjá Bjarna Hammer: Fyri eru Bjarna Hammer og Súsanna Bertholdesn
Ímóti eru: Kristin Micheslen, Alvi Mortensen, Jónhild Midjord Nybo og Mina Joensen
Harvið er tilmælið hjá Bjarna Hammer fallið.

Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Jónhild Midjord Nybo og Mina Joensen ynskja viðmerkt, at málið er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 2 viðgerðum fyrst 4. januar og 1. mars 2021.

**2/22**
**22/00025-1 TB -Tvøroyrar bóltfelag nýtslurætt til vøl og felagshús við Stórá 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.01.2022 | 4/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 7/22 |
| 3 Býráðið | 03.02.2022 | 2/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | | |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.10.2022**
Henrik Thomsen nevndarlimur í og umboðandi Tvøroyrar Bóltfelag TB, hevur vent seg til umsitingina, við umsókn vegna TB um nýtsluloyvið til vøllin og felagshúsið við Stórá at nýta til kappingarárið 2022.

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett er stuðulsjáttna á FÆ2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnvndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. januar 2022:**
Einmælt samtykt. Málið verur beint í Fíggjarnevndina og fyri Býráði.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt, at Tvøroyrar Bóltfelag TB, hevur fær nýtsluloyvið til vøllin og felagshúsið við Stórá at nýta til kappingarárið 2022. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at loyva Tvøroyrar Bóltfelag TB nýtsluloyvið til vøllin og felagshúsið við Stórá at nýta til kappingarárið 2022

**3/22**
**22/00016-2 TEKNISKA DEILD - BILAR - Ford Ranger XL Double cab - Nýggjur bilur er bílagdur í 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 5/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 4/22 |
| 3 Býráðið | 03.02.2022 | 3/22 |

**Málslýsing:**
Tveir minni last bilar (pick up) vóru bílagdir frá Wenzel í 2021 til Tvøroyrar havn og teknisku deild. Annar bilurin er komin, men hin bilurin, ein Ford Ranger XL double cab verður ikki veittur fyrr enn í februar ella mars í 2022. Seinkingar eru grunda Korona.
Á fíggjarætlanini fyri 2022, FÆ22 er peningur ikki settar av til hesa íløgu. Kostnaðurin er 459.000,- inkl. mvg.
Bíleggingarváttan er partarnar millum.

**Lógargrundarlag:**
Bíleggingarváttan og stýrisskipan hjá Tvøroyrar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Játtan á FÆ22 verður broytt.

**Tilmælið:**
Tekniska deild hevur brúka fyri bilinum, sum liður í at dagføra maskinur og amboð, til manning og deild. Við hesum verður málið latið teknisku nevnd og møguliga fíggjarnevndini, til støðutakan.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:**
Einmælt samtykt at beina málið í fíggjarnevdina.

**Tekniski leiðarin 19-01-2022:**
Peningur er ikki settur av á FÆ22 til keyp av nýggja Ford Ranger XL double cab. Hesin var bílagdur í 2021 skuldi eisini verið komin í 2021. Seinkingar av veitingini eru grunda Korona. Við hesum verður málið latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan. Biði verður um eyka játtan á kr. 459.000,- inkl. mvg. til íløgu stað 629 á FÆ22, tá farið verður út um sjálva fíggjarkarmin.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt, og at játtan verður veitt FÆ2022, §629

**Býráðið 03. februar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**4/22**
**22/00041-2 Tvøroyrar Skúli -Samvirknar talvur og KT útbúnaður 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.01.2022 | 2/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 15/22 |
| 3 Býráðið | 03.02.2022 | 4/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2022**
Tilmælið frá skúla stjóranum, Jón Johannesen um at dagføra Tvøroyrar Skúla við nýggjum samvirknum talvum og KT útbúnaði 2022.

Sum avtala á fundi 21.des. 2021, er her tilboð uppá talvurnar til Tvøroyrar skúla.

- Tilboð: Prometehean ActivPanel Titanium 86" á kr. 19.999,- + MVG

- Lising-avtalan viðv. lærarateldur verður endurnýggjað, soleiðis at lærarar fáa nýggjar teldur meðan skúlin keypir tær "gomlu" lærarateldurnar, at nýta til næmingateldur. (500,- pr.stk, 40 stk.)
- 8 stk. samvirknar talvur. Hetta tí vit ikki keypa nýggjar næmingateldur.

**Samla:**

- Talvur, 8 stk. á 19.999,- kr. 159.992,-
- Lærarateldurnar, 40 stk. á 500,- kr. 20.000,-
- Íalt Kr. 179.992,-

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ 2022, §411 íløgur skúlin

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. januar 2022:**
Einmælt samtykt og at játtanin verður tikin av §411 mála skúlan í Trongisvági.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**5/22**
**22/00043-2 Skjalhald 360 -mannagongdir 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 03.02.2022 | 5/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2022**
Mælt verður til at seta í verk reglugerð fyri skjalhald 360$^0$ fyri Tvøroyrar kommunu.

Skjalhald er ein felags journalskipan fyri tað almenna, ið verður nýtt til tess at tryggja eina einsháttaða og rætta málsviðgerð. Endamálið er at hava eitt so høgt støði, sum til ber á: skjalfestingini av málsviðgerðini. yvirlitinum yvir mál og skjøl. journal- og málkunnleikanum hjá starvsfólkunum.

Lesiturin fyri reglugerðina um skjalhald er mentur av Gjaldstovuni, og er her tillagaður til tørvin hjá Tvøroyrar kommunu.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

**Fíggjarligar avleiðingar: Ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt reglugerð um skjalahald, málið verður beint í býráðið

**Býráðið 03. februar 2022:**
Einmælt samtykt at tilmælið hjá fíggjarnevndini og seta í verk reglugerð um skjalhald.

**6/22**
**22/00083-1 Ungi arbeiði 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 16/22 |
| 2 Býráðið | 03.02.2022 | 6/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 18.05.2021)**
Mælt verður til at Tvøroyrar kommuna aftur í ár 2022 bjoðar ungum arbeiði í teirra summarfrítíð, sum byrjar 22. juni og endar týsdagin 17. august. Mælt verður til, at halda fram at lata tilboðið vera galdandi fyri skúlaungdómar í Tvøroyrar Kommunu, og hvør umsøkjari fær í mesta lagi arbeiði í tvær vikur.

**Lógargrundarlag:**

"Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017"
./. § 49. 1) Børn, sum ikki eru fylt 15 ár, kunnu ikki vera sett í arbeiði, sbr. tó stk. 8-9.
./. Stk. 2. 1) Tá ið ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, skal tað í sambandi við skipan og útinnan av arbeiðinum takast atlit til aldur, menning og heilsustøðu hjá tí unga, og at tann ungi hevur møguleika at røkja sína skúlagongd.

Arbeiðið hjá Tvøroyrar kommunu er ætlað fyri ung í bólkinum 15-16 ár.
Hettar merkir, at fyri at tú kanst luttaka í Ung í arbeiði, skalt tú:

- verða fylt/ur 15 ár, áðrenn tú meldar teg til, tó
- ikki fylla 18 ár í tí árinum, tú meldar teg til
- verða sinnað/ur og tøk/ur at arbeiða í tvær vikur í tínari summafríð.

**Fíggjarligar avleiðingar: Avsett játtan er á FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt at bjóða ungum í arbeiði á sumri 2022 í teirra skúlafrítíð.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at bjóða ungum í arbeiði á sumri 2022 í teirra skúlafrítíð.

Til kunningar

**1/22**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 9/21 |
| 12 Býráðið | 26.08.2021 | 20/21 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 10/21 |
| 14 Býráðið | 30.09.2021 | 25/21 |
| 15 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 14/21 |
| 16 Býráðið | 28.10.2021 | 29/21 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 15/21 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 17/21 |
| 19 Býráðið | 21.12.2021 | 35/21 |
| 20 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 1/22 |
| 21 Býráðið | 03.02.2022 | 1/22 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**

- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. apríl 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 2. september 2021.**
Samanbering av skatti 2020/2021 –jan aug.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað, málið verður beint í býraðið

**Býráðið 30. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 03. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**2/22**

**22/00036-2 Endaligt frágreiðing og eftirmeting av eldraøkinum -skriv frá Kommunufelagnum jan. 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.01.2022 | 6/22 |
| 2 Býráðið | 03.02.2022 | 2/22 |

**Býráðið 03. februar 2022:**
Málið var kunna og umrøtt

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at í eftirmetingini av eldraøkinum ger Umhvørvis og vinnumálaráðnum vart við, at tá kommunur skulu velja limir í eldarsamstarvið, skal hetta fara fram eftir lutfallsvalháttinum, og hetta verður ikki virt av Tvøroyrar býráð.

Kristin Michelsen ynskir viðmerkt, at eitt samt stýrið í Kommunufelagnum er ikki samt við niðurstøðuna hjá Umhvørvis og vinnumálaráðnum.

**3/22**
**22/00082-2 Vinabýir -[redacted]**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 03.02.2022 | 3/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 31.01.2022**
Fyrisp/ynskið er komið[redacted]um vinarbýiar samstarv, og er ætlanin at umboð[redacted]vitja í Føroyrum í april/mai. 2022.

**Lógargrundarlag:** Kommunufultrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Okent

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.
Einmælt samtykt at taka av innbjóðingini um vinarbýar samstarv við [redacted]

Fundurin lokin kl. 18:00

Kristin Michelsen

Jónhild Midjord Nybo

Alvi Mortensen

Mina Joensen

Bjarni Hammer

~~Kristina Roest~~

Súsanna Bertholdsen